**Bjørt Samuelsen**
**vegna Tjóðveldi**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 121/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)**

**Uppskot**

**til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 7. mai 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1 verður sum stk. 8 sett:
"*Stk. 8.* Foreldur at børnum, sum eru deyðfødd ella doyggja í barsilsfarloyvistíðini, hava sama rætt til barnsburðarfarloyvi sbrt. hesum kapittli."

**2.** Í § 4 verður "§§ 1-2" broytt til: "§§ 1, 2 og 7a".

**3.** Aftan á § 4 verður sett:
"**§ 4 a**. Í teimum førum, har foreldur eru av sama kyni, verða reglurnar eftir hesi lóg tulkaðar eftir somu treytum, sum hjá hinskyndum foreldrum. Treytirnar fyri at fáa rættindi sambært hesi lóg eru, at tey vátta fyri Barsilsskipanini, at tey eru gift ella liva í parlagi og eru sambúgvandi. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu barsilsfarloyvið og útgjaldið skal umsitast."

**4.** Í § 5 verður "§§ 1 og 2" broytt til: "§§ 1, 2 og 7a".

**5.** Í § 6 verður "§§ 1 og 2" broytt til: "§§ 1, 2 og 7a".

**6.** Aftan á § 7 verður sett:

**"Kapittul IIa**

**Fleksskipan av barsilsfarloyvi og barsilspeningi**

**§ 7 a.** Foreldur, ið eru løntakarar, og sum hava rætt til barsilsfarloyvi og barsilspening sambært reglum í hesi lóg, kunnu innan fyrstu trý árini frá tí degi, barnið er føtt, sjálvi velja, hvussu tey ynskja at skipa sítt barsilsfarloyvi og samsvarandi útgjald, hóast reglur ásettar í §§ 1, 2, 9 og 10. Foreldrini kunnu nýta barsilsfarloyvi samstundis frá tí degi, barnið er føtt.
*Stk. 2.* Um foreldur skipa sítt barsilsfarloyvi yvir eitt longri tíðarskeið enn ávikavist 52 og 56 vikur, sbrt. grein 1 og 2, skal avtala gerast um hetta við arbeiðsgevara fyri annað og triðja árið.
Barsilsfarloyvið og útgjaldið kann tó aldrin verða longri enn tíðarskeiðið ásett í hesi lóg.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um rættin og treytir til at skipa

barsilsfarloyvið og útgjaldið sambært hesi grein umframt reglur fyri fráboðanarfreist v.m.”

**7.** Í § 8 verður sum stk. 5 sett:
“*Stk. 5.* Lesandi, ið búgva og lesa í Føroyum og fáa studning frá Studna, hava rætt til fast ásett barsilsgjald sambært hesi lóg, hóast tey ikki eru fevnd av útrokningargrundarlagnum sbrt. kapitli IV. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um treytir hesum viðvíkjandi og støðd á útgjaldi av barsilspeningi.”

**8.** Í § 9, stk. 7 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Harumframt verður øll tíðin, barnið ella børnini liggja á sjúkrahúsi, løgd afturat teimum 8 vikunum, sbrt. 1. pkt.”

**9.** Í § 9 verður aftan á stk. 7 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 8.* Foreldur at børnum, sum eru deyðfødd ella doyggja í barsilsfarloyvistíðini, hava sama rætt til barsilspening sbrt. hesi grein.”

Stk. 8 verður eftir hetta stk. 9.

**10.** Í § 12 verður sum stk. 5 sett:
“*Stk. 5.* Hevur viðkomandi verið gjaldskyldugur sbrt. kapitli VI í hesi lóg í minsta lagi í 12 mánaðir, kann viðkomandi í sambandi við útbúgving ella arbeiði uttanlands í avmarkað tíðarskeið fara úr skipanini í eitt tíðarskeið og koma inn aftur í skipanina og fáa rætt til barsilspening, hóast viðkomandi ikki lýkur treytirnar í stk. 1. Útrokningargrundarlagið hjá viðkomandi verður tá roknað eftir seinastu 12 inntøkumánaðunum, viðkomandi hevur goldið inn í skipanina. Sjálvstøðugt vinnurekandi skulu somuleiðis kunna tekna trygging fyri samsvarandi tíðarskeið uttanlands. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um útrokningargrundarlagið.”

**11.** Í § 20, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Landsstýrismaðurin skal somuleiðis skipa fyri, at neyðug kunning um møguleikan at tekna trygging verður samskipað og miðlað út til øll, ið seta á stovn fyritøku.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag ella seinni.

**Almennar viðmerkingar**

Familjur eru ymiskar. Tær liva ymiskt. Eru ymisk samansettar, og tær raðfesta ymiskt. Tí skal barsilsskipanin eisini vera liðilig, so tit sum familja kunnu brúka hana, sum tað hóskar til júst tykkara tørv.

Tíðin saman við pinkubarninum er ein hin dýrmætasta yvirhøvur. Fyri barnið og fyri foreldrini. Tað eigur at vera ein sjálvfylgja, at barnið fyrstu árini av lívi sínum fær møguleika at vera nógv saman við foreldrum sínum. Tí tað er hesa tíðina, tryggleikin og tøttu bondini fyri restina av lívinum verða knýtt.
Lønta barsilstíðin skal leingjast til eitt ár – vit eru næstan har – men hon skal gerast munandi meira liðilig, so foreldur í størri mun kunnu leggja tíðina til rættis eftir tørvinum hjá barninum og familjuni yvir eitt longri tíðarskeið.

Í hesum lógaruppskoti verður skotið upp at broyta barsilsskipanina soleiðis, at hon verður munandi meira smidlig og betri fyri familjunar. Samandráttur av broytingunum:

- Barsilsvikurnar kunnu drýggjast og brúkast sum kvota ella klippikortskipan yvir 3 ár
- Foreldrini bæði gera heilt sjálvi av, nær tey brúka sín part av løntu barsilskvotuni. Til ber eisini hjá foreldrunum at brúka part av kvotuni samstundis

- Til ber at taka farloyvi frá skipanini tá ein er í útbúgvingar- ella arbeiðsørindum uttanlands, uttan at missa allan uppspardan rætt
- Fyri præmatur - tíðliga fødd børn – ber til at velja, at barsilsskipanin ikki byrjar at telja, fyrr enn barnið verður útskrivað av sjúkrahúsi
- Samkynd foreldur fáa javnsettan rætt til barnsburðarfarloyvi og barsilspening
- Foreldur, hvørs barn er deyðføtt ella doyr í barsilstíðini, hava sama rætt til barsilsfarloyvi og barsilspening.

*Fleksbarsil– smidlig skipan við klippikorti*
Skipanin verður gjørd smidlig soleiðis, at foreldrini kunnu brúka hana yvir 3 ár. Skipanin skal vera ein "klippikortskipan", har foreldrini sjálvi gera av, nær tey brúka sínar vikur. Eingin forðing skal vera fyri, at tey eru í farloyvi við barninum samstundis – kvotan er tó hin sama. Hvussu farloyvið verður uttanfyri fyrsta árið, má avtalst við arbeiðsgevara. Landsstýrisfólkið ger reglur um tíðarmørk fyri fráboðan o.s.fr. Hesar reglur skulu vera smidligar, so foreldur hava møguleika at umskipa ætlanirnar fyri farloyvið so hvørt, sum tíðin gongur. Mammur og pápar eiga framvegis sínar oyramerktu vikur, eins og stórur partur av farloyvinum er felagskvota, sum foreldrini býta sínámillum eftir egnum ynski. Talan er um ein møguleika, ikki eitt krav. Flestu foreldur velja kanska at brúka lønta farloyvið innanfyri eitt ár. Men fyri tey foreldur, sum hava møguleikan og ynskið at spara part av farloyvinum til seinni, skal hetta bera til.

Ongar familjur eru eins, og teirra tørvur er fjøltáttaður. Til dømis hava vit nógvar familjur, har pápin siglir úti, men er heima stóran part av árinum. Ella vit hava familjur, har annar arbeiðir sum sjálvstøðug/ur og kann leggja tíðina til rættis eftir tí. Bara fyri at nevna tvey dømi. Kanska mamman hevur hug at varðveita tilknýtið til arbeiðsplássið og arbeiða ein dag ella báðar tveir um vikuna ella nakrar heilar ella hálvar dagar av og á, tá makin er heima. Ella ger avtalu um at arbeiða seks tímar um dagin fyrstu tíðina, mamman ella pápin fara aftur til arbeiðis, og kann gera avtalu við arbeiðsgevaran um tað. Tá eigur tað at bera til at drýggja sær farloyvisdagarnar og brúka teir yvir eitt longri tíðarskeið.

Foreldrini kunnu sostatt velja at arbeiða lutvíst, og samstundis lutvíst vera í farloyvi - og so brúka restina av kvotuni seinni sum einstakar frídagar, ella skipaða frítíð eftir avtalu. Í eini liðiligari barsilsskipan skulu foreldur, í samráð við arbeiðsgevaran, kunnu spara sær dagar at brúka innanfyri tey fyrstu tvey til trý árini hjá barninum. Avtala skal so gerast við arbeiðsgevaran um, hvussu hetta verður lagt til rættis, og við Barsilsskipanina um útgjaldið.
Á henda hátt kann familjan leggja viðurskiftini til rættis, sum tað hóskar teimum best. Barnafamiljur hava ofta sera trupult við at fáa putlispælið við tíð, pengum, stovnsvenjing, sjúkradøgum og so frameftir at hanga saman. Ein fyrimunur í Føroyum er, at ofta er stutt ímillum arbeiðspláss og heim, og vit eru umgird av familju og hjálpandi hondum. Hetta ger, at tað til dømis væl ber til hjá mammuni at halda fast í bróstagevingini, hóast hon velur at arbeiða nakrar tímar um vikuna.

*Ikki missa rætt til útgjald vegna útbúgving*
Í verandi skipan gjalda øll, sum hava A-inntøku, fast inn til skipanina, og útgjaldið verður útroknað sum miðal av lønini seinastu 12 mánaðirnar. Sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu tekna sjálvbodna trygging, ið kostar 500 krónur árliga. Men fara fólk av landinum, til dømis fyri at útbúgva seg ella arbeiða eitt tíðarskeið, so missa tey rættin til útgjald, og mugu byrja at "spara uppaftur" í skipanini, tá tey flyta heim.

Skotið verður upp at áseta reglur fyri fólk, sum fara í útbúgvingar- ella arbeiðsørindum uttanlands soleiðis, at hesi kunnu halda fram í skipanini uttan at missa uppspardan rætt, meðan tey eru í útlegd eitt avmarkað tíðarskeið.

Fólk, sum hava goldið inn í skipanina í minst eitt ár, skulu kunna fara í faraloyvi frá skipanini. T.v.s., at flyta tey av landinum til dømis í lestrarørindum, so skal bera til at "telja víðari" frá tí degi, tey flyta aftur til Føroyar. Ikki skal vera neyðugt at byrja av nýggjum. Útrokningargrundarlagið verður tá at rokna 12 teir seinastu inntøkumánaðirnar, har tey hava goldið inn í skipanina.

Harumframt fær landsstýrismaðurin heimild í kunngerð at áseta reglur um gjald til lesandi. Hesi hava ofta bert studning at liva av, og hóast eyka lestarstuðul og barnaískoyti, er trupult hjá lesandi at fáa endarnar at røkka saman.

*Hækka loftið fyri útgjald*
Barsilsskipanin er trygging fyri mista arbeiðsinntøku við barnsburð, sum øll við A-inntøku og allir almennir og privatir arbeiðsgevarar gjalda inn til. Tá barsilsskipanin varð innførd fyri skjótt 20 árum síðan, var hámarkið fyri útgjald úr skipanini munandi hægri – 35.000 kr. Talan er um skattskylduga inntøku.
Tá markið varð lækkað til 25.000 kr, vóru fleiri, sum vístu á, at hetta fór at føra við sær, at fáir pápar fóru at taka farloyvi. Hetta tí at í miðal forvinna páparnir munandi meira enn mammurnar, og í fíggjarliga roknistykkinum hjá familjuni vildi tað í flestu førum loyst seg best, at mamman tekur alt farloyvið. Ætlanin var upprunaliga, at barsilgjaldið skuldi kunna tillagast lønarvøkstri.

Landsstýrismaðurin hevur í dag sbrt. galdandi lóg heimild til at nýta møguleikan í tann mun, fíggjarlig orka er í grunninum til tess. Landsstýrismaðurin kundi til dømis ásett, at fult endurgjald fyri løn bert verður givið upp til 25.000 kr, og at fyri løn oman fyri tað, til dømis upp til 30.000 kr - verður bert lutvíst endurgjald givið, til dømis 50%.

*Smidleiki í útgjaldi*
Í dag er lógarfestur rættur til 52 vikur barsilsfarloyvi, meðan barsilsgjald úr Barsilsgrunninum verður latið í 48 vikur. Summi foreldur velja at leingja farloyvið við óløntum farloyvi. Skotið verður upp, at foreldrini kunnu velja at fáa barsilsútgjaldið strekt yvir eitt longri tíðarskeið. Avtala skal tá gerast við skipanina um, hvønn brøk tey ynskja at fáa útgoldið mánaðarliga. Dømi: Ein mamma hevur rætt til útgjald í 10 mánaðir, men hevur tikið avgerð um at vera 14 mánaðir í barsil. Gjaldið kann tá eftir umsókn býtast yvir 14 mánaðir. Landsstýrismaðurin ger nærri reglur um hetta.

*Betri rættindi til ov tíðliga fødd børn*
Hjá foreldrum, sum føða ov tíliga – præmatur børn – verður møguleiki at byrja barsilsútgjaldið frá tí degi, barnið verður útskrivað av sjúkrahúsinum. Útrokningargrundarlagið verður seinastu 12 mánaðirnar frá tí, mamman fór í farloyvi/sjúkrafarloyvi. Reglurnar mugu helst samskipast við almannagjøld, sum eru viðkomandi í mun til ov tíðliga fødd børn.

*Betri kunning*
Áleggjast skal avvarðandi myndugleika at kunna øll, sum seta á stovn fyritøku, um møguleikan at tekna barsilstrygging. Øll sum fáa eitt barn, eiga við føðing ella tá barnið kemur til familjuna, eiga at fáa gjølla kunning um rættindini í sambandi við barnaburðarfarloyvi. Tað kundi hóskandi verið TAKS, ið átti at kunnað øll sjálvstøðugt vinnurekandi um møguleikan at tekna trygging.

Í svari upp á fyrispurning vísti landsstýrismaðurin á, at einans 7 av oman fyri 1000 útgjøld úr Barsilsskipani eru til sjálvstøðugt vinnurekandi. Og einans fá sjálvstøðugt vinnurekandi tekna hesa trygging. Sjálvstøðugt vinnurekandi eru sostatt illa tryggjað í mun til barsilsgjald.

Landsstýrismaðurin eigur tí at umhugsa, um fyrimunir og vansar við at fara frá sjálvbodnari trygging til ásetta trygging fyri sjálvstøðugt vinnurekandi.

*Vinn-vinn skipan*
Øll ynskja vit, at nýføðingar okkara fáa eina góða byrjan í lívinum, við tøttum og kærleiksfullum tilknýti til foreldrini.

Við eini liðiligari skipan fáa familjurnar størri møguleika at skraddaraseyma farloyvið til teirra egna tørv, so tær lættari kunnu fáa gerandisdagin at hanga saman. Hetta er til fyrimuns fyri foreldrini, arbeiðsgevaran, og ikki minst fyri barnið, sum fær ágóðan av, at foreldrini betur kunnu leggja tíðina til rættis. Foreldrini kunnu velja at varðveita sambandið við arbeiðið og standa tí betur í mun til menningarmøguleikar í starvinum, meðan arbeiðsgevarin sleppur undan, at arbeiðsplássið missir eitt dugnaligt starvsfólk í langa samanhangandi tíð. Og barnið fær betri høvi at knýta seg til bæði foreldur.

Ein góð og smidlig barsilsskipan er avgerandi táttur, tá ræður um at eggja familjum at virka, liva og eiga børn síni heima í Føroyum.

Málið má eisini verða, at fáa longt skipanina upp í 52 løntar barsilsvikur, og nakrar eyka vikur afturat fyri ættleiðingarforeldur og foreldur, sum fáa fleiri børn í senn. Hetta má gerast so hvørt, sum fíggjarorka er í grunninum til tess.

Barsilskipnanin skal hóska til Føroyar anno 2020, har familjurnar eru samansettar og ymiskar – men allar hava sama ynski: At geva barninum best møguliga byrjan upp á lívið.

**Fíggjarligar avleiðingar**
At gera skipanina munandi meira smidliga fer ikki í sjálvum sær at vaksa um útreiðslurnar. At lønta barsilsfarloyvið kann strekkjast yvir longri tíð, kann í fyrsta umfari gera, at minni verður goldið úr grunninum, men sum frá líður skuldi tað blivið nøkulunda tað sama, sum eftir verandi skipan.

Nakað meira kann roknast av umsiting, í øllum føri í fyrstani, men verandi játtan til umsiting verður mett at kunna dekka hesar broytingar.

Tá umræður bøtt rættindi fyri útgjald til ov tíðliga fødd børn, so hava hesi longu rætt til 8 vikur eyka. Neyvt ber ikki til at siga, hvat longd lønt barsilstíð merkir fyri tey fáu, sum hava tørv á longri tíð, men tað verður væntandi ikki stórar upphæddir.

Ein meira fleksibul skipan kann við tíðini fara at merkja, at pápar í størri mun brúka sín part av barsilskvotuni. Av tí at hesir forvinna væl meira enn mammurnar í miðal, kann tað við tíðini vaksa um útreiðslurnar.

Velur landsstýrismaðurin at brúka heimildina at lata lesandi fast ískoyti úr grunninum, kostar hetta nakað. Verður til dømis ásett, at lesandi fáa 1.000 kr. í barsilsískoyti um vikuna í 48 vikur, og er talan um 30 børn, so kostar tað 1,44 mió. kr. meira árliga. Er stuðulin bert 500 kr. um vikuna, og er talan um 60 børn, kostar tað somuleiðis 1,44 mió. kr.

Inntøkurnar í grunninum vaksa tó loypandi, so hvørt, sum lønarlagið í samfelagnum hækkar. Fleiri ár hevur verið fitt yvirskot, okkurt árið undirskot, men samlað sæð hevur yvirskot verið í grunninum.

**Serligar viðmerkingar**
<u>Til § 1</u>
Til nr. 1. og nr. 9. Foreldur, hvørs barn er deyðføtt ella doyr í barsilstíðini, hava sama rætt til barsilsfarloyvi og barsilspening.

Til nr. 2, 4 og 5. Konsekvensbroytingar í sambandi við, at nýggj regla, § 7a, verður sett inn í lógina.

Til nr. 3. Fær eitt par av sama kyni eitt barn, verður rættarstøðan hon, at tann, sum ikki ber barnið, fær barsilsrættindi líknandi, sum ein pápi fær í dag.
Treytirnar fyri at fáa rættindi eru, at tey skulu vátta fyri Barsilsskipanini, at tey eru gift ella liva í parlagi og eru sambúgvandi.
Landsstýrismaðurin fær heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur um, hvussu barsilsfarloyvið og útgjaldið í hesum føri skal umsitast.

Til nr. 6. Nýggjur kapittul verður settur inn.
Hóast ásettar reglur eru í lógini, verður nýggj serskipan gjørd, so skipanin er meira fleksibul fyri foreldrini. Tað skal vera møguligt hjá foreldrum at brúka skipanina yvir 3 ár. Skipanin skal vera ein "klippikortskipan", har foreldrini sjálvi gera av, nær tey brúka sínar vikur. Eingin forðing skal vera fyri, at tey eru í farloyvi við barninum samstundis – tí kvotan er hin sama. Hvussu farloyvið verður aftan á fyrsta árið, má avtalst við arbeiðsgevara. Harnæst fær landsstýrismaðurin heimild til at gera reglur um rættin og treytir til at skipa barsilsfarloyvið og útgjaldið sambært hesi grein umframt reglur fyri fráboðanarfreist v.m.

Til nr. 7.
Lesandi, ið búgva og lesa í Føroyum, og sum fáa studning frá Studna, fáa rætt til barsilsgjald, hóast tey ikki eru fevnd av útrokningargrundarlagnum. Landsstýrismaðurin fær heimild í kunngerð at áseta reglur um stødd á útgjaldinum og treytir annars.

Til nr. 8. Fyri barn ella børn, ið verða fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni, kunnu fáa alla tíðina, ið barnið ella børnini liggja á sjúkrahúsi, lagda afturat teimum 8 vikunum, ið hesi frammanundan fáa sambært galdandi lóg.

Til nr. 10. Skotið verður upp at fólk, sum fara í útbúgvingar- ella arbeiðsørindum uttanlands kunnu halda fram í skipanini, uttan at missa uppspardan rætt, meðan tey eru í útlegd eitt avmarkað tíðarskeið.
Fólk, sum hava goldið inn í skipanina í minst eitt ár skulu kunna fara í farloyvi frá skipanini. T.v.s., flyta tey av landinum til dømis í lestrarørindum, so skal bera til at "telja víðari" frá tí degi, tey flyta aftur til Føroyar. Ikki skal vera neyðugt at byrja av nýggjum. Útrokningargrundarlagið verður tá at rokna 12 teir seinastu inntøkumánaðirnar, har tey hava goldið inn í skipanina.
Ásetingin er eisini galdandi fyri sjálvstøðugt vinnurekandi, sum somuleiðis kunnu tekna trygging fyri tíðarskeið uttanlands. Heimilað verður landsstýrismanninum at gera nærri reglur um útrokningargrundarlagið hjá sjálvstøðugt vinnurekandi.

Til nr. 11. Ásett verður, at landsstýrismaðurin skal skipa fyri, at neyðug kunning um møguleikan at tekna trygging verður samskipað og miðlað út til øll, ið seta á stovn fyritøku.

Til § 2:
Gildiskomuáseting.
Lógin verður galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag, sum lógin fær gildi, ella seinni.

**Á Løgtingi, 6. mars 2020**

Bjørt Samuelsen